**Uppskot til**

**Kunngerð**
**um**
**serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligan stuðul**

Við heimild í § 4, stk. 7, sbr. stk. 5, í § 12, stk. 3, sbr. stk. 2, í § 24, stk. 4, sbr. stk. 3 og § 45, stk. 7, sbr. stk. 6 í í løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum broytt við løgtingslóg nr. 46 frá 10. mai 1999, løgtingslóg nr. 128 frá 22. des. 2000, løgtingslóg nr. 53 frá 9. mai 2005, løgtingslóg nr. 64 frá 7. juni 2007, løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009, løgtingslóg nr. 67 frá 26. mai 2011, løgtingslóg nr. 157 frá 18. desember 2017 og løgtingslóg nr. 44 frá 30. apríl 2018, verður ásett:

*Virkisøki*

**§ 1.** Serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk fata um pkt. 1, 2 og 3, og sernámsfrøðiligur stuðul fata um pkt. 4 og 5:

1) At skipa skúlagongdina og undirvísingina við atliti at fortreytum hjá einstaka neminginum,
2) At leggja til rættis serligt undirvísingarligt tilfar og tøknilig amboð, sum eru neyðug fyri læring, menning og virkisførleika hjá einstaka neminginum,
3) At skipa og undirvísa í virkishættum og arbeiðshættum, sum hava til endamáls at menna virkisførið hjá einstaka neminginum,
4) At venja í virkishættum og arbeiðshættum, sum hava til endamáls at menna virkisførið hjá einstaka neminginum, og
5) At veita persónligan og praktiskan stuðul, sum kann hjálpa neminginum í gerandisdegnum í sambandi við skúlagongdina.

*Stovnan av serundirvísing, sernámsfrøðiligum átøkum og sernámsfrøðiligum stuðli*

**§ 2.** Serundirvísing, sernámsfrøðilig átøk og sernámsfrøðiligur stuðul kunnu stovnast sum:

1) Serundirvísing, sum verður veitt nemingum, sum ikki hava fingið nøktandi úrtøk úr vanligu undirvísingini. Hetta kunnu vera nemingar, ið hava serliga tørv, ið ikki er fyribils, sbrt. §12, stk. 2 í løgtingslógini. Hesa undirvísing skipar Førleikastova og leiðsla skúlans saman við avvarðandi lærara ella flokstoymi og í samráð við Sernámi. Serundirvísingin kann bert í undantaksføri vera veitt og skipað sum einstaklings undirvísing.
2) Sernámsfrøðilig átøk, sum kunnu vera serundirvísing í bólkum í eitt tíðarskeið og innan ávís evni ella lærugrein.
3) Sernámsfrøðiligur stuðul, sum verður veittur at venja og stuðla uppundir læri- og menningartilgongdina hjá nemingum í serligum avbjóðingum og til at hesi kunnu vera í flokkinum. Miðað skal eftir, at nemingurin er inkluderaður í flokkin.

*Stk. 2.* Um skúlin heldur, at nemingurin hevur tørv á serundirvísing ella sernámsfrøðiligum stuðli, sum ikki kann gevast í vanligu undirvísingar- ella nemingalagaðu undirvísingini ella innan serundirvísingini, skal ein námsfrøðilig og ella sálarfrøðilig kanning fyriliggja, sbrt. §12, stk. 2 í løgtingslógini.

*Stk. 3.* Sernám samskiftir við Førleikastovu og skúlaleiðsu og í samráð við avvarðandi verður mett um tørvin. Út frá hesari

meting, verða átøk sett í verk. Um neyðugt er við kanningum verður altíð tikið støði í einari samlaðari fakligari metan í samstarvi við allar partar.

*Námsfrøðilig og sálarfrøðilig meting*

**§ 3.** Námsfrøðilig/sálarfrøðilig kanning verður gjørd í samráð við næmingin og foreldur.

*Tilráðing*

**§ 4.** Frágreiðingin frá Sernámi verður skrivliga fráboðað skúlaleiðaranum við avriti til foreldrini ella verja.
*Stk. 2.* Um næmingurin hevur tørv á serundirvísing, sernámsfrøðiligum átøkum ella sernámsfrøðiligum stuðli, skal frágreiðingin frá Sernámi eisini fata um eina tilráðing um, hvussu serundirvísingin, sernámsfrøðiliga átakið ella námsfrøðiligi stuðulin skulu skipast sbrt. §§ 1 og 6.
*Stk. 3.* Um foreldur ella verji nokta fyri, at næmingurin verður ávístur til Sernám, skal skúlaleiðari kunna Barnaverndina um avgerðina hjá foreldrunum sbrt. §12, stk. 2 í løgtingslógini.

*Dagføring*

**§ 5.** Skúlin tekur í samráð við Sernám avgerð um serundirvísingina, sernámsfrøðiliga átakið og tann sernámsfrøðiliga stuðulin.
*Stk. 2.* Skúlin kunnar foreldur ella verja og næming, hvussu serundirvísingin, sernámsfrøðiliga átakið og ella sernámsfrøðiligi stuðulin verður lagdur til rættis, áðrenn skipað verður fyri serundirvísing, sernámsfrøðiligum átaki og ella sernámsfrøðiligum stuðli.
*Stk. 3.* Skúlaleiðarin hevur ábyrgd av og fylgir við menningini og úrtøkuni hjá næminginum, sum fær serundirvísing, sernámsfrøðiligt átaki og ella sernámsfrøðiligan stuðul.
*Stk. 4.* Á hvørjum ári verður støða tikin til, um serundirvísingin, sernámsfrøðiliga átakið og ella sernámsfrøðiligi stuðulin skal halda fram, skal broytast ella steðgast. Skúlin kunnar í samráð við Sernám, foreldur ella verja og næmingin, í tí vavi tað er hóskandi, um avgerðina.
*Stk. 5.* Støða til serundirvísingina, sernámsfrøðiliga átakið og ella sernámsfrøðiliga stuðulin fyri komandi skúlaár sbrt. stk. 3 skal vera tikin í seinasta lagi í mai mánaði.

*Staðseting*

**§ 6**. Sernámsfrøðilig undirvísing, sernámsfrøðiliga átakið og stuðul verða skipað soleiðis:

1) Næmingur gongur í vanliga flokkinum, men kann eisini vera undirvístur og ella fáa stuðul einsæris ella saman við øðrum uttanfyri floksundirvísingina í bólkum, tó í mesta lagi helvtina av undirvísingartíðini sbrt. § 13, stk. 5 í løgtingslógini, og varðveitir tilknýti til flokkin, ella
2) Næmingurin gongur í serflokki í skúlanum, í serflokki í øðrum skúla ella í serskúla.

*Ávísing*

**§ 7.** Ávísing til serflokk ella serskúla er treytað av, at mett verður, at tað er meira gagnligt fyri næmingin at fáa undirvísing í sertilboði í styttri ella longri tíðarskeið.
*Stk. 2.* Sernám saman við viðkomandi skúla skulu gera eina meting og tilráðing til serflokk ella serskúla. Henda tilráðing verður gjørd í samráð við foreldur ella verja og næming í tí vavi, tað er hóskandi.
*Stk. 3.* Støða til tilráðing til serflokk ella serskúla fyri komandi skúlaár sbrt. stk. 2 skal vera tikin í seinasta lagi í mai mánaði.

*Skipan*

**§ 8.** Serflokkar umfata serligar skipanir í tí vanliga fólkaskúlanum, har givin verður undirvísing og sernámsfrøðiligur stuðul.
*Stk. 2.* Eftir góðkenning landsstýrismansins kunnu serflokkar vera skipaðir.
*Stk. 3.* Sernám hevur vegna landsstýrismannin innlit og yvirlit yvir næmingar í serflokkum og serskúla.

**§ 9.** Um næmingur gongur í serflokki ella serskúla hjá øðrum skúlamyndugleika, enn í tí kommunu, hann er búsettur, verða skúlaútreiðslurnar goldnar av kommununi, har næmingurin býr.
*Stk. 2.* Skúlin boðar heimstaðar kommununi hjá næminginum, sum flytur í sertilboð í aðrari kommunu, frá flytingini beinanvegin.
*Stk. 3.* Árliga skúlagjaldið, sum heimstaðarkommunan hjá næminginum skal rinda, sbrt. stk. 1, er tann upphædd skúlamyndugleikin á staðnum rindar til rakstur fyri hvønn næmingin í sertilboðnum. Avdráttur, renta og leiga eru ikki íroknað rakstrarútreiðslunum.
*Stk. 4.* Heimstaðar kommunan hjá næminginum ber kostnaðin av næmingaflutninginum í og úr skúla.

**§ 10.** Sernámsfrøðilig undirvísing ella sernámsfrøðiligur stuðul, sum fer fram í serflokki ella serskúla, skal endurskoðast á hvørjum ári. Støða skal á hvørjum ári takast til, um sernámsfrøðiligi stuðulin skal halda fram, skal broytast ella steðgast.
*Stk. 2.* Skúlaleiðarin fyri serskúla ella serflokk tekur avgerð í samráð við Sernám, foreldur og næmingin í tí vavi, tað er hóskandi.

*Undirvísingartíðin*

**§ 11.** Undirvísingartíðin hjá næmingi, sum fær serundirvísing og ella sernámsfrøðiligan stuðul, skal fylgja ásetta vikutímatalið sbrt. §19 í løgtingslógini.
*Stk. 2.* Skúlaleiðarin kann í serligum førum eftir tilmæli frá Sernámi og í samráð við foreldur ella verja og næmingin, í tí vavi tað er hóskandi, søkja Mentamálaráðið um at lækka tímatalið.

*Próvtøka*

**§ 12.** Næmingar, ið fáa serundirvísing og ella sernámsfrøðiligan stuðul í vanliga flokkinum, í serflokki og ella serskúla, kunnu fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan sbrt. § 21 í kunngerðini um próvtøkur fólkaskúlans.
*Stk. 2.* Um ein lærugrein er sera torfør hjá næmingi, kann næmingurin verða frítikin fyri lærugreinina. Hetta verður gjørt í samráð við foreldrini ella verja og næmingin, í tí vavi tað er hóskandi, og Sernám.
*Stk. 3.* Skúlaleiðarin tekur avgerð um próvtøku eftir serligari fyriskipan ella frítøku í samráð ella eftir tilmæli frá Sernámi ella Førleikastovuni og í samráð við foreldur ella verja og næmingin sbrt. §§ 9, 21 og 53 í kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans.

*Frítøka*

**§ 13.** Um næmingur verður frítikin fyri talmeting av úrtøkuni í eini ella fleiri lærugreinum, skal próvtøkuskjalið í samráð við lærarar, næming og foreldrini gevast sum støðumetingarskjal sbrt. § 53 í kunngerð um próvtøkur fólkaskúlans.

*Flyting*

**§ 14.** Um næmingur, sum fær serundirvising, sernámsfrøðiligt átak ella sernámsfrøðiligan stuðul, flytur í annan skúla, skal skúlaleiðarin í skúlanum, hann flytur frá, boða Sernámi frá flytingini.

*Starvsfólk*

**§ 15.** Lærarar skulu lesa serundirvísing og sernámsfrøðilig átøk og námsfrøðingar kunnu røkja sernámsfrøðiligar stuðuls uppgávur sbrt. § 1.

*Eftir loknan fólkaskúla*

**§ 16.** Um mett verður, at næmingur við loknan fólkaskúla framvegis hevur tørv á sernámsfrøðiligum stuðli, ráðgeving ella vegleiðing, kunnar skúlin ella serskúlin í samráð við Sernám foreldur og næming um møguleikar.
*Stk. 2.* Skúlin ella serskúlin tekur, í seinasta lagi í mars mánaði, saman við Sernámi, neyðug stig til samstarv við viðkomandi stað, har næmingurin fer eftir loknan fólkaskúla, um næmingurin ynskir tað. Hetta við tí endamáli at økja um møguleikar at gagnnýta yrkisførleikar og

møguleikar at taka miðnám ella aðra útbúgving.

**§ 17.** Avgerðir sbrt. hesi kunngerð kunnu kærast sbr. § 59 í løgtingslógini.

*Gildiskoma*

**§ 18.** Henda kunngerð kemur í gildi 1. august 2018.

Mentamálaráðið xx. juni 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen

**Uppskot til**

**Kunngerð um broyting í kunngerð um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing**
(Broyta ásetingina um játtanarmyndugleika)

**§ 1**

Í kunngerð nr. 6 frá 2. februar 2015 um heimaundirvísing og sjúkraundirvísing verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 2, stk. 1 verður: "ella Sernám" strikað.

**2.** Í § 2, verður stk. 2 orðað soleiðis:
"*Stk. 2.* Er talan um likamliga sjúku og smittuvanda, verður umsóknin send Mentamálaráðnum saman við læknavátttan og ella frágreiðing frá serkønum um orsøkina til sjúkrafáveruna. Serkunnleiki kann umframt lækna vera barnaverd, sálarfrøðingur, skúlaleiðari ella leiðarin í Førleikastovuni.

**3.** Stk. 3 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 3.* Tá ið talan er um aðra sjúkrafráveru, skal tilmæli frá Sernámi leggjast við umsóknini, sum verður send Mentamálaráðnum.

**§ 2**

Henda kunngerð kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Mentamálaráðið, 7. juni 2018

**Rigmor Dam**
landsstýrismaður

/ Poul Geert Hansen